

# Finnast at Danmark fyri vantandi tilbúgving í Grønlandi

**Jan Müller**

13.09.2013 - 11:17

Oljan.fo

Ríkisgrannskoðararnir í Danmark finnast í eini nýggjari frágreiðing harðliga at donsku tilbúgvingini og trygging av havumhvørvinum í Arktis og í Grønlandi, sum í vaksandi mun verður hótt av økta flutninginum til havs.

Í frágreiðingini verður funnist at donsku handfaringini av einum øki, har Danmark sambært ríkisfelagsskapinum hevur ábyrgd av at loysa uppgávur kring leiting, bjarging, tryggari sigling og havumhvørvi.

Skrivað verður, at Danmark hevur ikki gjørt nokk fyri at tillaga tilbúgvingina til broyttu váðarnar fyri menniskju og umhvørvi orsakað av økta flutninginum í grønlendskum sjógvi.

Danska Løgmálaráðið og Verjumálaráðið hava ábyrgdina av bjargingar- og tilbúgvingararbeiðinum og sambært ríkisgrannskaðanini er tørvur á at samskipa arbeiðið betur og fáa eitt greiðari ábyrgdarbýti millum tær báðar ráðharrastovurnar.

Verjumálaráðið hevur haraftrat ábyrgdina av at hava eftirlit við havumhvørvinum og tryggja, at lóggávan í Grønlandi verður hildin.

Verandi støða er ikki nøktandi. Eitt nú hevur verjan ikki kannað í nóg stóran mun, um reglur í havumhvørvisskipanini frá 2004 eru hildnar. Eitt nú fyribyrjgandi eftirlit við um skip halda reglurgerðir fyri flutningi við dálkandi evnum.

Heldur ikki hevur Verjumálaráðið tikið váðan fyri dálking av havumhvørvinum í pørtunum hjá ríkisfelagsskapinum í Arktis í nóg stórum álvara. Heldur ikki hvat viðvíkur starvsfólki og útgerð til at kunna átaka sær uppgávur.

Út frá hesum heita ríkisgrannskoðararnir myndugleikarar til at styrkja fyribyrgjandi arbeiðiðm og at verjan tryggjar, at útgerð, sum stendur í Danmark, og sum skal brúkast í Arktis til leiting og bjarging og til at faa bilbukt við dálking av havumhvørvinum, er egnað til arktisku viðurskiftini.

Avvarandi ráðharrar skulu svara hesum aftur innan fýra mánaðir skriva danskir miðlar.